## → RAKSTRARLEIÐARI TIL PF. ATLANTIC BIOTECHNOLOGY



Vilt tú vera við til at stjórna einum slóðbrótara innan føroyska fiskivinnu? So er starvið sum rakstraleiðari á Pf. Atlantic Biotechnology leyst at søkja.

### UM TEG

Tú vísir fyrst og fremst engagement og dugir at leiða og taka avgerðir. Tú hevur eisini viðkomandi royndir innan matvøru-framleiðslu, og fyrimunur er at hava útbúgving og innlit í framleiðslustýring og innaneftirlit á matvøruvirkjum.

Sum rakstrarleiðari fært tú ábyrgd av dagligu framleiðsluni, har tínar uppgávur verða at skipa arbeiðið og at tryggja, at framleiðslan lýkur ásett krøv.

Talan er í fyrsta lagi um royndartíð á 3-6 mánaðir við góðum møguleika fyri føstum starvi. Løn sambært avtalu.

### UM OKKUM

Atlantic Biotechnology arbeiðir við framkomnari virðisøking av fiskatilfeingi, eitt nú við at virka proteinkonsentrat og olju á ymsum góðskingarstigum.

Fyritøkan, sum heldur til á Oyri, varð stovnað í 2006 og hevur síðan miðvíst fyrireikað grundarlagið undir framleiðsluni.

Talan er um nýbrot í føroyskari tilfeingisvinnu, og klárt er nú at fara til verka.

SENDISTOVAN

UMSÓKNIR
Umsóknir við avritum av viðkomandi skjølum skulu sendast til Atlantic Biotechnology, Postboks 70, FO 450 Oyri. **Umsóknarfreistin er 15. november 2010.**

Vilt tú hava meira at vita um starvið, set teg í samband við Gest Hovgaard, stjóra, á telefon 564101 ella á abt@abt.fo.



# TEMADAGUR

## um samanspæl millum føroyskan landbúnað og lívfrøðiligt margfeldi

Í sambandi við, at ár 2010 er altjóða ár fyri lívfrøðiligt margfeldi, ynskir Lívfrøðingafelagið at varpa ljós á føroyskan landbúnað, lívfrøðiligt fjølbroytni og samanspælið teirra millum. Hetta verður gjørt við at hava ein temadag í Norðurlandahúsinum leygardagin 30. oktober frá kl. 14 til 18.

**Fyrilestrahaldarar verða m.a.:**

- *Anna Guðrun Þórhallsdóttir, professari við Landbúnaðaruniversitetið í Hvanneyri, tosar um íslendsk alidjór og ávirkan á landslagið.*
- *Andrias Reinert tosar um føroysk alidjór, við serligum denti á gæs, dunnur og høsn.*
- *Olga Biskupsstøð tosar um arbeiðið hjá útoyggjafelagnum við at menna rættir úr siðbundnari rávøru.*

**Sí skránna á heimasíðuni hjá Norðurlandahúsinum *www.nlh.fo***

Tiltakið er partur av verkætlanini "Lívfrøðiligt margfeldi í Føroyum", sum er fíggjað við stuðli frá játtanini til umhvørvisverndartiltøk hjá Innlendismálaráðnum.



sd.fo

# SkeiðsDepilin
**– So fært tú neyðuga førleikan**

Skeiðsdepilin arbeiðir við eftir- og víðariútbúgving á Føroya Handilsskúla og Tekniska Skúla. Vit vilja geva tær neyðuga førleikan at fremja tey verk, sum tú hevur sett tær fyri.



Sosialurin 341800

# Sveisiskeið

Allastaðni innan maskin-, skipasmíð og líknandi framleiðslu er tørvur á fólki, ið duga at sveisa. Endamálið við sveisiskeiðnum er, at læra grundleggjandi sveising, sveisiástøði, umhvørvi og trygd. Undirvísingin er ástøðilig og verklig, tó mest verklig. Skeiðsdepilin bjóðar hesi skeið út eftir tørvi:

- **Grundskeið í sveising – 72 skúlatímar**
  Gasssveising, flammuskering, tig-sveising, mag-sveising, eletrodu-sveising og trygd innan sveising.
- **Grundskeið í TIG-sveising – 36 skúlatímar**
  TIG-sveising av kant- og stumpseymum í plátu
- **Grundskeið í MIG/MAG-sveising – 36 skúlatímar**
  MIG/MAG-sveising av kant- og stumpseymum í plátu
- **Grundskeið í elektrodu-sveising – 36 skúlatímar**
  Elektrodusveising av kant- og stumpseymum í plátu
- **Grundskeið í gass-sveising – 36 tímar**
  Sveising við oxygen og acetylen í ólegeraðum stáli í hornaseym, kantseym, tunnplátu og rørsveising
- **Endurnýggjan av sveisisertifikati**
  Møguleiki er fyri at endurnýggja sveisisertifikati

*Undirvísingin ferð fram á Tekniska Skúla í Havn og undirvísari er Jeffri Olsen. Fá meira at vita um skeiðini á okkara heimasíðu **www.sd.fo**, ella ring á tlf. 318813*

SkeiðsDepilin | Marknagilsvegur 75 | postboks 3239 | FO-110 Tórshavn | tel 318813 | fax 313374 | info@sd.fo



# HEVUR TÚ KJEKK Á TÍNARI HEILSU?

NÝTT FRÁ 1. NOV

## APOTEKIÐ BJÓÐAR NÚ HEILSUKJEKK

SMÁAR LÍVSTÍLSBROYTINGAR HAVA STÓRAN TÝDNING, SERLIGA UM TÆR VERÐA GJØRDAR NÓG TÍÐLIGA. ERT TÚ Í IVA UM TÍNA HEILSUSTØÐU, SO KOM INN OG HOYR NÆRRI UM HEILSUKJEKKIÐ Á APOTEKINUM







VIT MÁTA
- BLÓÐTRÝST
- KOLESTEROL
- BLÓÐSUKUR
- BMI
- PEAKFLOW

Kom inn og fá ein faldara!

Heilsukjekk fæst á:
Norðoya Apotek............tel. 45 50 55
Tjaldurs Apotek.............tel. 34 11 00
Eysturoyar Apotek........tel. 47 12 00
Suðuroyar Apotek.........tel. 37 10 76

**Kostnaður kr. 250,-**

apotek